


## SMYRIL LINE SØKIR SAMSKIPARA TIL ALTJÓÐA SØLU OG MARKNAÐARFØRING

Í samstarvi við sølu & marknaðarstjóran skalt tú leggja til rættis og seta í verk sølu og marknaðarætlanir í 10 marknaðum. Tú arbeiðir bæði við strategiskum og taktiskum sølu- og marknaðarátøkum. Hartil skalt tú greina og fastleggja prísir, gera prístariffar og arbeiða við sølutølum og statistikki. Tú kemur eisini at takast við søluuppfylging og samskifti við eksternar veitarar, herundir lýsingarfyritøkur.

**Vit bjóða**
Eitt fjølbroytt, avbjóðandi og mennandi starv í altjóða umhvørvi.

**Vit ynskja**
Royndir innan sølu og marknaðarføring. Viðkomandi útbúgving, t.d. cand. merc. Árræði, talskil og eitt gott grafiskt eyga. Tú mást tosa og skrive enskt, og dugir tú onnur fremmandamál er hettar ein fyrimunur. Eitt sindur av ferðing má væntast.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu sendast til:

Smyril Line
P.O. Box 370
FO -110 Tórshavn
Att: Hendrik Egholm

Umsóknir kunnu eisini sendast við telduposti til:

he@smyril-line.fo

Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 20.02.06 kl. 12.00

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hendrik Egholm á tlf. 34 59 39.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

# Fulltrúi til Kappingarráðið

Skrivstovan hjá Kappingarráðnum søkir við hesum eftir fulltrúa at byrja sum skjótast

**Uppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:

- at menna eftirlitsvirki stovnsins
- at gera kanningar um kappingarviðurskifti
- at skriva frágreiðingar og vegleiðingar
- at viðgera kærumál
- at tilevna reglugerðir og mannagongdir

Harumframt kunnu vera líknandi uppgávur at loysa fyri Post- & Fjarskiftiseftirlitið, Tryggingareftirlitið og Skráseting Føroya.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava:

- búskaparfrøðiligt prógv ella líknandi
- royndir innan privata ella almenna fyrisiting
- kunnleika til kappingar- og marknaðarviðurskifti (fyrimunur, men ikki ein treyt)
- kunnleika til edv á brúkarastøði

Umsøkjarar skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt, hava hegni til at samstarva og duga at arbeiða undir trýsti.

**Skrivstovan hjá Kappingarráðnum kann bjóða**
Eitt sera fjøltáttað og sjálvstøðugt starv við avbjóðandi uppgávum, ið eru persónliga og yrkisliga mennandi, umframt møguleika fyri nógvum samskifti við norðurlendskar kappingarmyndugleikar og aðrar myndugleikar í Føroyum.

Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar, umframt ráðstevnur innan kapping.

**Setanartreytir**
Setanartreytir vera eftir galdandi sáttmála við BLF, Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya.

Setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýrir.

Umsókn, prógv og møgulig ummæli skulu sendast til:

**Kappingarráðið**
**Skálatrøð 20**
**Postboks 73**
**FO-110 Tórshavn**

og vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 6. mars 2006 kl. 12.00.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Terja Sigurðsson, ráðsskrivara, tel 35 60 40, ella Jógvan Thomsen, stjóra, tel 35 60 20.

Kappingarráðið

*Kappingarráðið umsitur løgtingslóg nr. 83 frá 6. juni 1997 um kapping. Lógin hevur til endamáls at fremja kapping og harvið styrkja virkisførið í framleiðslu og handli av vørum og tænastum. Annars at skapa mest møguligt gjøgnumskygni viðv. kappingarviðurskiftum og at gera tiltøk ímóti avmarking av vinnufrælsinum og øðrum skaðiligum árinum av kappingaravmarkingum. Kappingarráðið er sett sambært løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1997, og hevur sama stjóra og skrivstovu sum Post- & Fjarskiftiseftirlitið, Tryggingareftirlitið og Skráseting Føroya.*

TEAM85